## DAGSINS MEINING

# Tinghella um gransking og mentan

Tinghellan her í Miðalhúsinum mánakvøldið var sera upplýsandi, og innleggini frá teimum báðum Jenny Petersen og Rúnu Hilduberg varpaðu ljós á tveir stórar spurningar í dagsins samfelag. Støðan hjá mentanini og støðan hjá granskingini. Vit skulu her bert umrøða granskingina, men venda vit aftur til mentanina seinni. Framløgan um granskingina var, hóast hon var merkt av afturvendandi niðurlag um trot á samskipan og trot á peningi, rættiliga bjartskygd. Seta vit okkum mál, raðfesta vit rætt og samskipa vit gransking í Føroyum, so kann granskingin fáa stóran týdning fyri menningina. Eisini visión 2015 var eitt afturvendandi evni á fundinum.

Framløgan vísti, at vit eru langt frá altjóða krøvunum um, at 3% av BTÚ skulu nýtast til gransking og nýskapan, um eitt framkomið samfelag skal kunna fylgja við. Víst varð á, at játtanirnar til gransking og nýskapan eru alt ov smáar og alt ov spjaddar. Men nú bendir sambært framløguna alt á, at granskingin verður samskipað, og skuldi hetta givið betri møguleikar fyri at raðfesta føroyska gransking. Ein annar spurningur snúi seg um viðurskifti millum gransking og vinnu og orðið nyttugransking var mangan á lofti. Vinnan er lítið við í dagsins gransking, men við tí samskipan, ið er á veg, verður vinnan tikin við upp á ráð, og hon verður umboðað í einum nýggjum granskingarráð, ið skal hava til endamáls at orða granskingarpolitikkin. Hetta var alt sera áhugavert. Men tað, sum manglaði var eitt boð uppá, hvussu tann nýggi granskingarpolitikkurin skuldi fíggjast. Hetta kom serstakliga fram undir drúgvari umrøðu av granskaraparkini, ið skal byggjast á Debesartrøð. Hon skal byggjast fyri vinning av einskiljingum, men eingin kundi upplýsa, hvussu raksturin skal fíggjast.

Nú má landsstýrið koma út úr runninum og fáa hesa nógv umrøddu samskipan av granskingini framda. Soleiðis var boðskapurin frá fundinum. Landsstýrið má eisini kunna almenningin um, hvussu ein stórfingin og visonerur granskingarpolitikkur skal fíggjast. Sambært upplýsingar á fundinum er ikki tann stóri viljin at játta pengar til hetta økið. Ja, í roynd og veru hevur tað gingið tann øvugta vegin tey seinastu árini. Hesin veruleiki hongur ikki saman við visión landsstýrisins og øll tey føgru orð um tann týdning granskingin hevur fyri samfelagið. Hetta er í roynd og veru tann tyngri parturin av hesum máli. Um samskipanarætlanin ikki verður fylgd av eini veruleikanærari fíggjarætlan, er vandi fyri, at alt dettur á gólvið. Hetta var ein niðurstøðan, og her mugu vit siga okkum at vera samd.

**Sosialurin**

# Minniskonsert, meistaraskeið og framúr tónleikarar á vitjan





**Konsertfelagið fer nú undir virkisárið 2005/06. Fyrsta tiltakið verður vitjan av Elisabeth Westenholz, klaver og Toke Lund Christiansen, floyta**

TÓNLEIKUR

Hesi bæði fara at framføra síðst í hesum mánaðinum. Elisabeth Westenholz leggur fyri á klaverinum. Hon fer, eftir egnum ynski, at framføra tær so víðakendu Diabelli-variatiónirnar fyri soloklaver leygardagin 27. august kl. 19.30 í Læraraskúlahøllini. Konsertin er til heiðurs fyri listamálaran Eyvind Mohr, sála, ið var vinmaður Elisabeths. Eyvindur yndaði allan góðan tónleik og serstakliga Beethoven.

Sunnudagin verður so konsert við næmingum á Tórshavnar Musikkskúla, ið hava luttikið á sokallaðum master-skeiði hjá Toke Lund Christiansen. Hetta, at vitjandi tónleikarar hava undirvísing í samband við vitjanina, er nærum vorðin fastur táttur í fyriskipanini. Tað eru nógvir dugnaligir floytunæmingar á Tórshavnar Musikkskúla og verður spennandi at hoyra, hvat ið Toke, ið er lærarari á tí Kongaliga Danska Musikkonservatoriinum, kann fáa burturúr hesum ungu talentunum.

Henda konsertin verður sunnudagin 28. august kl. 16.00 í Læraraskúlahøllini.

Ókeypis atgongd er til báðar hesar konsertirnar.

Mikudagin 31. august kl. 19.30 verða so tey bæði at hoyra í Norðurlandahúsinum. Har fara tey at borðreiða við einari fjølbroyttari skrá. Á skránni er barokktónleikur eftir Johann Sebastian Bach, floytukrás eftir Friderich Kuhlau, ið hóast týskføddur, ídag verður roknaður sum eitt tað mætasta danska tónaskaldið. Kuhlau er serstakliga yndaður av floytuleikarum. So er franskur tónleikur at hoyra eftir Francis Poulenc. Hansara mæta Sonata fyri floytu og klaver, er eitt av høvuðsverkunum innan kamartónleik úr 20. øld. Albert Roussel hevur skrivað eitt verk, ið hann nevnir »Floytuleikarar«, har ið hann ímyndar sær fýra ymsar mytologiskar persónar, ið allir eru floytuleikarar, m. a. Pan og Krishna.

Tey bæði, Elisabeth Westenholz og Toke Lund Christiansen hava á hvør sínum økið verið sera frammaliga í altjóða høpi. Elisabeth framførir allar teir gomlu meistararnir Mozart, Beethoven, Schumann, Grieg, Rachmaninoff og eisini hevur hon nýliga verið solistur í Skt. Pætursborg, har hon framførdi fyrstu klaverkonsertina hjá Sjostakovitj. Sum kamartónleikari ferðast hon víða og hevur innspælt fyri fremstu plátufeløgini, m. a. BIS og Kontrapunkt.

Toke Lund Christiansen er solofloytuleikari í Radiosymfoniorkestrinum í Keypmannahavn og sum nevnt er hann eisini millum fremstu kennarar í Norðanlondum. Hann hevur ferðast kring allan knøttin við floytukynstrum sínum. Hann hevur harafturat innspælt hópin av fløgum og nýliga var hann á konsertferð í Japan, við tí vælkendu floytukonsertini eftir Carl Nielsen.

Konsertfelagið er sera fegið um at tað hevur eydnast at fáa hesi bæði at vitja. Eisini er tað gott, at tey leggja okkurt eftir seg við at geva frálæru til ungu talentini á Tórshavnar Musikkskúla.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.